# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*Hergeir, Vilmhelm, Arna og Turid Rósa fingu ein lítlabeiggja 19. februar. Hann var 48 cm langur og vigaði 3125 gr.*

11. mars fingu Fía og Karl Magni Hammer, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

13. mars fingu Vera og Jógvan Mørkøre, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3375 gr.

13. mars fingu Ingilín Holm og Jákup Símun Simonsen, Hoyvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3150 gr.

13. mars fingu Jóna Maria Malunardóttir og Sámal Kyrrigerð, Vági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3600 gr.

14. mars fingu Silvia Maria og Eyðstein Skipanes, Runavík, eina dóttur. Hon var 42 cm long og vigaði 1530 gr.

16. mars fingu Sólgerð Jacobsen og Mortan Joensen, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4250 gr.

16. mars fingu Tommy L. Jacobsen, Leirvík, og Lise-Lotte B. Vindelbo, Svendborg, ein son. Hann vigaði 4030 gram og var 53 sentimetur langur.

18. mars fingu Bergtóra Joensen og John Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3900 gr.

**Dagurin**
**20. mars. Gordius**, deyður umleið 300. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*




# Bergfinnur professari í matematikk

**Vitugur vestmenningur verður professari í Kjøpinhavn**

Fríggjadagin, tann *20. mars, kl. 14.15* verður stórhending í tí føroysku akademikaraverðini og í øllum útisetaumhvørvinum, tá ið Bergfinnur Durhuus, sum er ættaður úr Vestmanna, verður alment útnevndur til professara í matematikk við Kjøpinhavnar Universitet.

Henda dagin er hátíðarhald á *H. C. Ørsteds-instituttinum í auditorium nr. 4*, og Bergfinnur skal halda sín fyrsta fyrilestur sum kosin universitets-professari um evnið ”*Random geometry*”.

Síðani Christian Matras gavst í 1964, hevur eingin annar føroyingur havt professaraheiti í Kjøpinhavn, og Christian var tann allarfyrsti føroyski professarin.

At vit nú fáa ein nýggjan føroyskan professara í Kjøpinhavn, er sjálvandi fyrst og fremst ein heiður fyri Bergfinn sjálvan; men vit útisetar eru eisini ernir av honum, og tað kunnu allir føroyingar vera.

Matras var professari í føroyskum og øðrum norrønum málum. Vit hava sjálvsagt nógva virðing fyri humaniora; men tað er avgjørt meira intellektuelt stimbrandi, at vit føroyingar eisini hava fingið eitt matematiskt riddaraslag og ein úrmæling á tí natúrvitskapliga økinum.

Tey natúrvísindaligu fakini hava tíanverri ikki verið serliga forkelaði henda síðsta mansaldurin, hvørki í Føroyum ella í Danmark, hóast tey flestu vita, at hesi fakini eru grundarlagið og fortreytin fyri øllum framburði. Bergfinnur hevur fleiri ferðir varliga gjørt vart við, at hann ikki heldur, at hansara fak, t.e. *matematikk, kemi og fysikk* verða nóg væl hagreidd í dagsins skúlum, hvørki í barnaskúlum ella á hægri lærustovnum.

Bergfinnur gjørdist studentur úr Havn 1970. Hann verður cand.scient frá Kjøpinhavnar Universiteti í 1976. Sum stipendiatur arbeiddi hann eitt skifti við fronsk universitet. Seinni arbeiddi hann á einum fysiskt/matematiskum stovni undir Niels Bohrs-instituttinum, inntil hann í 1984 varð settur sum adjunktur við sjálvt Kjøpinhavnar Universitet.



Fýra ár seinni, t.e. í 1988 gjørdist hann lektorur, og er endiliga í dag sum 58 ára gamal útnevndur til professara við tann lærustovn, har hann hevur fingið sína aðalútbúgving.

Vit eru nógvir útisetar, sum ætla okkum út á H. C. Ørsteds-stovnin at fagna Bergfinni Durhuus og ynskja honum tillukku við bæði starvi og titli (heiti).

**Virgar T. Dalsgaard**

# Binding & Design á Seglloftinum

Komandi leygardag heldur Katrina í Geil fyrilestur um “Binding og Design”. Støðið verður tikið í føroyskari binding fyrr, nú og framyvir – frá bindisniðum á Føroya Fornminnissavni til catwalk í París og London.

Katrina er designari frá Designskolen Kolding, og hevur selt design til m.o Calvin Klein og Filippu K. Hon er eisini við á framsýningini DK:Knit í Norðurlandahúsinum í løtuni.

Fyrilesturin verður á Seglloftinum á Tvøroyri leygardagin 21. mars kl. 13:00 til uml. 15:00. Kostnaður 100 kr. (limir 70 kr.). Høvið verður eisini at keypa sær ein drekkamunn.

Tað eru Valkyrjurnar, sum skipa fyri, og øll eru vælkomin!



*Katrina í Geil*

**“The Best og You”**

Katrina hevur eisini hollar royndir sum stylistur, hon hevur skeið bæði privat og professionelt, og frílansar m.a. fyri blaðið Kvinna, bæði sum stylistur á Nýggj Kvinna og sum dekoratør.

“The Best of You” er skeiðið til allar kvinnur, ið vilja síggja fantastiska gott út, júst sum tær eru. Og leygarkvøldið kl. 19:00 bjóðar hon kvinnum í Suðuroy at luttaka á hesum skeiði, sum varðar 4 tímar. Kostnaður 500 kr. Íroknað er tilfar fyri hvønn luttakara. Tekning á tlf. 281885.